*Framhald av síðu 4*

dagin undan útgávukonsertini. Fløgan er komin út nakrar dagar frammanundan og hevur longu selt væl.

Hesir báðir plátufelagsmenninir høvdu fyrr ein handil, ið seldi harraklæðir. Handilin gekk væl, ikki minst tí teir gjørdu nógv burturúr at fáa kundarnar at kenna seg vælkomnar. Millum annað høvdu teir ta skipan, at keypti tú fyri yvir tíggjutúsund íslendskar krónur, vart tú boðin til ein cognac í bakrúminum, greiddi ein íslendskur blaðmaður mær frá, tá eg spurdi meg fyri, hvat hetta vóru fyri menn.

Men klædnahandilin varð seldur fyri nøkrum árum síðan, og ístaðin fóru teir báðir inn í tónleikavinnuna - aftur á ein nakað øðrvísi hátt enn vanligt. 12 Tónar byrjaði sum plátuhandil, men ætlanin var altíð at fara undir útgávu. " Men fyrst skuldu vit læra alt, sum var vert at vita um tónleikavinnuna, bæði í Íslandi og uttanlands. Og tað tók sína tíð. Ætlanin var at vit skuldu geva fyrstu fløguna út í ár 2000, men eg læri seint, so Krákan við Eivør gjørdist okkara fyrsta", sigur ein smáskemtandi Lárus Jóhannesson. Nú angrar hann á ongan hátt at eingin fløga varð givin út í ár 2000.

"Um eg kundi valt millum allar fløgur í heiminum, so hevði eg valt hesa fløguna hjá Eivør sum ta fyrstu útgávuna hjá plátufelagnum", sigur Lárus og heldur fram at rósa einasta tónleikara higartil í básinum hjá plátufelagnum. "Tað fyrsta, sum fólk altíð leggja merki til við Eivør, er hennara fantastiska rødd. Men hon hevur meira enn bara sína rødd. Hon er eitt fullkomið listafólk. Lurtar tú veruliga eftir sangunum, sum hon skrivaði, tá hon var enn yngri, so eru teir heilt fantastiskir. Eivør hevur eftir mínum tykki longu tikið føroyska tónlistarliga arvin longur enn flestu fólk geva sær far um."

Við 12 Tónum og føroysku umboðskvinnu síni, Sigvør Laksá, hevur Eivør fingið fólk í ryggin, sum kunnu taka sær av øllum tí praktiska í sambandi við tónleikalívsleið hennara. Men okkurt bendir á, at hon eisini kundi brúkt eina telefondamu. Ta tíðina, útsendi blaðmaðurin fylgir Eivør, verður fartelefonin brúkt so nógv, at tað als ikki undrar, at hetta amboðið sær eitt sindur slitið út. Tá tænarin kemur við teimum litríku indiskt hagreiddu høsnarungalørunum á matstovuni, har vit um kvøldið fáa okkum ein bita, verður ljóðið á telefonini sløkt. Stutt eftir at seinasti bitin er farin niðurum, boðar telefonin frá seks ósvaraðum uppringingum. Bara ein fær aftursvar.

Tað er vorðið seint, og útgávukonsertin skal vera kvøldið eftir. Men sangarinnan tykist taka tað róliga og uttan stress, hóast hon nú verður noydd at fara at venja við tveimum kórgentum, og Jákup

**"Ferðin ígjøgnum tær ymisku tónleikasjangrurnar hevur verið mín lívsins skúli. Fyrst havi eg lært meg eitt, so havi eg skift stíl og lært okkurt annað og soleiðis hevur tað hildið fram til nú. Og tað steðgar ikki her."**

Magnussen frá Útvarpi Føroya ringir og minnir hana á eina avtalu um at møta í útvarpsstovuni morgunin eftir, áðrenn klokkan hevur sligið hálvgum átta. Eivør skal syngja beinleiðis í morgunsendingini. Tað hevði hon lukkuliga gloymt.

Dagin eftir er Eivør at finna í operuni allan dagin. Framførslan skal fáast at passa saman, pallkjólin skal passast til, og harumframt skal Eivør passa sín leiklut yvirfyri fjølmiðlunum, sum aftur í dag eru ein partur av umhvørvinum kring hana. Eitt lítið sjónvarpslið kemur inn eftir gólvinum, og skjótt syrgir Eivør sum tann natúrligi leiðarin á pallinum, fyri at savna hinar tónleikararnar saman í rættari raðfylgju framman fyri upptøkutólið. So verður einasti íslendski sangurin á nýggju fløguni spældur tríggjar ferðir ígjøgnum til æru fyri myndamannin, áðrenn tey venda aftur til ljóðroyndina.

Í einari stillari løtu eydnast tað at fáa Eivør undir fýra eygu í operakjallaranum og spyrja hana, hvat í veruleikanum er hent, síðan hon fór til Íslands fyri skjótt tveimum árum síðan. "Hvat er hent? Bíða, eg hugsi so sjáldan um sovorðið. Jú nógv er hent. Eg havi gingið á klassiskum sangskúla og havi lært at sungið opera. Og so eri eg byrjað at spæla saman við nøkrum góðum íslendskum tónleikarum. Eg havi í heila tikið spælt nógv og lært eina rúgvu, bæði um mín sang og um alt møguligt annað." Árini í Føroyum tóktist Eivør at skifta tónleikagrein sum vit onnur skifta sjónvarpsrás. Og nú opera?

"Ja, eg havi sungið nógv ymiskt og tað fari eg at halda fram við at gera. Men fyri mær er tað ikki so løgið, tí eg síggi tónleik sum eina stóra heild og býti hann ikki so nógv upp í hetta og hatta slagið. Tað er sum ein ferð, sum eg skal ígjøgnum. Beint nú er tað til dømis ógvuliga torført at svara uppá hvønn tónleik eg gevi út á fløguni. Fløgan er sum ein buffét við øllum tí sum eg havi verið ígjøgnum higartil. Ferðin ígjøgnum tær ymisku tónleikasjangrurnar hevur verið mín lívsins skúli. Fyrst havi eg lært meg eitt, so havi eg skift stíl og lært okkurt annað og soleiðis hevur tað hildið fram til nú. Og tað steðgar ikki her."

"So tað at eg nú gangi á einum klassiskum sangskúla merkir ikki at eg ætli mær at vera operasangarinna. Tað er bara fyri at fáa meira niður í lummarnar so at siga. Fáa eina góða barlast til ferðina víðari."

Ein tónleikasjangra, sum Eivør byrjaði at fáast við fyri nógvum árum síðan, men sum hon ongantíð hevur slept aftur, er Kingosangur. Hvat er tað við hesum Kingosanginum og Eivør?

"Eg kenni tað sum at Kingosangur á onkran hátt liggur inni í mær. Langabbabeiggi mín, Hans Jacob á Brúnni, sáli, sang nógv

**"Eg havi onkuntíð umhugsað um eg heldur skuldi farið aftur í skúla ella funnið mær eitt vanligt arbeiði, serliga tá tað ikki hevur gingið so væl. Men eg haldi, at tá man hevur eitt mál, ein dreym, so skal gera tað, sum man helst vil."**

Kingo, og vit høvdu ein bólk saman við tveimum øðrum. Vit plagdu at møtast einaferð um vikuna fyri at syngja Kingo. Tað havi eg lært sera nógv av."

Umframt langabbabeiggjan eru eisini aðrir einstaklingar, sum Eivør kennir seg myndaða av sum tónleikara. Mamma hennara, Sædis, eigur eitt serligt pláss í so máta. "Mamma hevur havt øgiliga nógv at týða fyri meg, bæði persónliga og tónlistarliga", sigur Eivør og nevnir, at millum hini, sum hava lært hana nógv eru kingosangarin Vilhelm Magnussen og amerikanski saxofonisturin John Purcell, sum hon hevði sum lærara eina tíð. "Allir teir sum eg spældi við í bólkinum Ivory lærdu meg eisini nógv um tónleik, og tíðin í Ivory var sum heild sera spennandi tónlistarliga." Seinstu tíðina hevur eisini Ólöf Kolbrún, sum Eivør hevur búð hjá síðan hon kom til Íslands, havt stóra ávirkan á hana sum tónleikara. "Ólöf hevur lært meg nakað ógvuliga umráðandi, nevniliga at ansa eftir mínari rødd. Tað er ein spurningur um at læra seg at kenna røddina soleiðis at man veit nær tað er tíð at hvíla seg. Tað er faktiskt ein lívsstílur meira enn nakað annað."

Røddin hjá Eivør er væl fyri nú, og tað er restin av sangarinnuni eisini. Men hon hevur eisini onkuntíð sjálv kent seg eitt sindur uppslitna. Síðan hon sum 16 ára gomul gjørdist liðug við fólkaskúlan hevur hon við heilum hjartað satsað upp á tónleikin sum sína lívsleið, uttan at tað nakrantíð hevur sæð út sum hon hevur ivast. Men hon hevur onkuntíð hugsað um at valt ein tryggari veg.

"Tankin hevur verið har, men eg havi ongantíð sagt tað við nakran. Eg havi onkuntíð umhugsað, um eg heldur skuldi farið aftur í skúla ella funnið mær eitt vanligt arbeiði, serliga tá tað ikki hevur gingið so væl við tónleikinum. Men eg haldi, at tá man hevur eitt mál, ein dreym, so skal gera tað, sum man helst vil. Tað kann vera eitt sindur tungt. Tí tað er ikki tann tryggasti vegurin at velja. Tú veitst ongantíð um tað nú fer at rigga ella ikki. Men tað snýr seg bara um at byggja seg sjálvan upp og trúgva uppá tað, sum man ger."

Dreymurin hjá Eivør hevur altíð verið at gerast tónleikari. Og tað er stórt sæð tað, sum hon er nú.

"Nú livi eg bara í dreyminum. Eg hugsi ikki, at einaferð skal eg gera hetta ella hatta. Eg geri tað, sum eg vil gera. Eg vil bara gjarna sleppa at gera mín tónleik og geva mínar fløgur út."

*So títt mál er rokkið?*

"Nei, sjálvandi ikki. Tá málið er rokkið kann man akkurát tað sama fara í grøvina. Men eg gangi ikki og droymi um nakað annað enn tað, eg havi nú. Eg vil bara gera tað betri og mennast, og so vil eg sjálvandi eisini gjarna koma víðari út í heimin at spæla. Tað eru nakrir ávísir tónleikarar, sum eg gjarna vil spæla saman við, eitt nú Jan Garbarek. At spæla saman við honum er eitt mál og ein dreymur fyri meg."

Á vegnum fram ímóti dreymi sínum hevur Eivør tikið nakrar elevatorar. Teir flestu hava gingið uppeftir, og nakrir av teimum skjótastu hava verið tónleikakappingar. Slíkar kappingar plaga tónleikarar vanliga at hava nokkso ullintar kenslu fyri. Eivør er avklárað við sína støðu.

"Faktiskt havi eg tað gott við tónleikakappingum. Men eg haldi at alt hevur sína javnvág. Um man sum tónleikari bara livir fyri kappingum, so er man eftir mínum tykki á skeivari leið. Men kappingar eru góð springbretti til alt møguligt annað. Ársins songrødd gav til dømis mær eitt ordiligt skump frameftir. Og tað gevur eitt sjálvsálit at vera við í slíkum kappingum. Mín luttøka í íslendska Grand prixnum hjálpti mær eisini nógv í so máta. So eg havi einki ímóti tónleikakappingum, men eg haldi kortini ikki, at tað ber til at kappast um tónleik. Tónleikur er kenslur, og tú kanst ikki kappast um kenslur. Og hvat vinnur tú við at vinna eina tónleikakapping? Tú dugir ikki betri at syngja fyri tað."

Stilla løtan í operkjallanum er lokin. Teir tríggir tónleikararnir

**"Eg hugsi ikki at eg einaferð vil eg vera hetta ella hatta. Eg eri tað, sum eg vil vera."**

eru komnir niðurundir og eru farnir at skifta klæðir. Ein letur seg úr buksunum og letur seg í einar aðrar. Fyri tann uttanfyristandandi er tað ómøguligt at siga hvørjar av buksunum eru snøggari ella nýggjari. Báðar eru myrkar, og tað er troyggjan eisini. Hinir báðir tónleikararnir eru eisini klæddir eins spennandi og skuggi teirra á gólvinum. Í dag eru teir handverkararnir og Eivør tann einsamalla stjørnan. Meðan hon ger seg til reiðar at fara inn á pallin, tosa vit um fløguna, sum er høvið til konsertina.

"Hon er akkurát sum eitt lítið barn fyri mær. Soleiðis kenni eg tað nú. Hetta eru mínir sangir, sangir sum eg havi sitið um næturnar og gjørt. So tað er nakað øgiliga persónligt, og tí er tað umráðandi fyri meg at arbeiða við einari fløgu til hon er akkurát sum eg vil hava hana. So fari eg altíð at kunna standa við tað, sum eg havi gjørt. Eg eri enn glað fyri gomlu fløguna, og eg vil gjarna hava somu kenslu um hesa fløguna um nøkur ár."

*Hvussu langt væntar tú at fløgan kemur?*

"Eg hugsi als ikki um tað. Eg fari bara at hava hana bara við mær har sum eg komi. At gerast ein stjørna er eingin dreymur. Mamma hevur altíð lært meg at gera tað, sum ger meg lukkuligan. Fyri meg snýr tað seg bara um at syngja og kunna liva av tí. Tá eri eg lukkulig."

Á pallinum er myrkt og í salinum er friðarligt. Ljóðið av roykmaskinuni, sum blæsur hvít skýggj uppeftir, er tað einasta, sum brýtur tøgnina. Eivør er á veg niðan ígjøgnum trappurnar og upp á pallin at gera tað, sum hon er best til.

*Myndir: Rúnar*



